# Fiskivinnuskúlin vann European Business Game

**Enn einaferð vunnu næmingar á Fiskivinnuskúlanum EBG-kappingina. Hesaferð var tað bólkurin P/F Fargel við framleiðslu av gelantin úr skræðu og fiskabeinum**

KAPPING
*Tíðindaskriv*



*Vinnarabólkurin, ið er myndaður av Sigurð Marner Simonsen, Levi Nybo og Ásmundur Hansen, fekk steyp frá Mentamálaráðnum umframt gávu frá Føroya Banka. Harumframt fer vinnarabólkurin at umboða Føroyar í evropeisku endakappingini, ið verður í Kekkia í juli í ár*

Fríggjadagin 26. mars 2004 var føroyska endakappingin í European Business Game hildin í Vestmanna. 8 bólkar luttóku í endakappingini, og nógv fólk høvdu leitað sær niðan í Vestmanna Skúla fyri at hyggja at. Vinnari av kappingini gjørdist bólkurin P/F Fargel, ið er mannaður við næmingum frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Hugskotið hjá vinnarabólkinum var at framleiða gelantin burturúr skræðu og møguliga fiskabeinum. Klaus Rasmussen frá Rasmussen og Weihe, ið var ein av teimum fýra dómarunum, legði í sínari niðurstøðu dent á, at allir bólkar høvdu arbeitt dúgliga, og at fleiri av íbirtarahugskotunum vóru sera áhugaverd, og tí fingu tveir bólkar gávu fyri góð og original hugskot. Ein bólkur frá Tekniska Skúlanum í Klaksvík fekk gávu frá Føroya Sparikassa fyri hugskot um at framleiða eina lampu, har keyparin umvegis netið sjálvur kann bíleggja og rinda lampuna, og partvíst sjálvur kann sniðgeva lampuna við støði í ymiskum modulum. Ein bólkur frá Handilsskúlanum í Tórshavn fekk gávu frá Norðoya Sparikassa fyri hugskotið um at nýta »blue tooth«-tøkni til billyklar, so tað er lætt at finna lykilin.

Vinnarabólkurin, ið er myndaður av Sigurð Marner Simonsen, Levi Nybo og Ásmundur Hansen, fekk steyp frá Mentamálaráðnum umframt gávu frá Føroya Banka. Harumframt fer vinnarabólkurin at umboða Føroyar í evropeisku endakappingini, ið verður í Kekkia í juli í ár.

Vestmanna kommuna hevur altíð sýnt EBG-tiltakinum stóran áhuga, og Vestmanna kommuna hevði fríggjadagin lænt EBG-tiltakinum høli til endakappingina, og harumframt stílaði kommunan fyri góðum kaffiborði til allar luttakarar og áskoðarar, meðan dómararnir dømdu uppgávurnar, sigur Claus Reistrup, sum er í stýringarbólkinum fyri EBG í Føroyum.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 14, 2004
www.kaupthing.fo

# Mærsk fall 11,5% í virði fríggjadagin

At ísraelskir stjórnarhermenn í farnu viku gjørdu av við Hamas leiðaran Yassin og at fraklendingar funnu eina bumba á jarnbreytini uttanfyri París, fekk partabrøv og rentur at lækka. Øktur vandi fyri yvirgangi fekk íleggjarar at útseta íløgur í virðisbrøv, samstundis sum hesir krevja ein hægri vinning fyri váðan.

Vantandi nýtsla í Evropa fekk miðbankastjóran at siga, at teir vóru til reiðar at taka neyðugu stigini, um nýtslan ikki øktist. Hetta varð tulkað sum, at ein rentulækking í juni er møgulig. Hetta trýsti evruna og renturnar niður, so at danska 10 ára lánsbrævarentan kom á lægsta stigi síðani juli mánað í fjør.

Eftir kunngerðina um, at vøksturin í USA er óbroyttur 4,1% og at færri fólk søktu um arbeiðsloysisstuðul, hækkaðu amerikanskar rentur og partabrøv. Tjóðbankin gjørdi tó greitt, at teir tolnir vilja bíða til prísvøksturin er vorðin støðugur og arbeiðsmarknaðurin greitt sýnir batar, áðrenn teir seta rentuna upp.

Fríggjadagurin gjørdist eitt satt vónbrot hjá teimum sum høvdu væntað eina bjartskygda roknskaparkunngerð frá Mærsk. Partabrøvini fullu 11,5% í virði, hóast yvirskotið aftaná skatt vaks úr 12 milliardum til 17 milliardir krónur og sølan øktist 3,5% til 157 milliardir í 2003. Orsøkin til vónbrotið var, at leiðslan ikki helt útlitini vera eins bjørt og íleggjarnir høvdu vónað. Jess Søderberg stjóri metti, at farmaflutningurin fer at økjast orsakað av vøkstrinum í heimsbúskapinum, men at samlaða úrslitið fyri 2004 ikki fer at broytast munandi um dollarin fer at liggja 10% undir miðal fyri 2003. Mærsk er serliga viðbrekið fyri broytingum í dollaranum, tí flestu inntøkurnar eru tengdar at honum. Partaeigarar skulu ikki vænta sær eitt eykaútgjald nú felagið fyllur 100 ár og eginognin er komin uppá 92 milliardir krónur, hóast hetta sambært leiðsluni "teoretiskt" er gjørligt.
Endin á farnu viku gjørdist góður, so spennandi verður at síggja, um mótrørslan á virðisbrævamarknaðunum í seinastuni er av á hesum sinni. Arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA hesa vikuna, kann gerast tíðandi fyri rentugongdina komandi vikurnar.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,29% | -0,03% |
| 5 ára lánsbræv | 3,34% | 0,00% |
| 10 ára lánsbræv | 4,07% | 0,04% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 262,1 | -0,9% |
| OMX, Svøríki | 682,4 | 3,0% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.657,5 | 1,9% |
| S&P 500, USA | 1.108,0 | 1,2% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 109,64 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 167,30 | 0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 77,62 | -0,7% |
| Altjóða Vøkstur | 63,74 | 1,7% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 613,43 | 1,6% |
| EUR | 744,52 | 0,0% |
| GBP | 1.114,10 | -0,1% |
| NOK | 88,02 | -0,4% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*





*Condoleeza Rice vil ikki lata almenningin vita, hvat hon og forsetin vistu um hóttanir frá al-Qaeda, og hvørji stig tey tóku*

# Yvirgangsmenn keyptu donsk pass

**Hevur spanska løgreglan rætt, ganga minst 30 yvirgangsmenn við donskum passi uppi á sær, sjálvt um teir einki hava við Danmark at gera**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sponsku løgreglumenninir, sum kanna yvirgangsatsóknina í Madrid tann 11. mars, vilja vera við, at yvirgangsmenninir hava havt samband við viðhaldsfólk í Danmark og Svøríki.

Eitt nú heldur løgreglan seg vita, at maðurin, sum skipaði fyri atsóknini, jordanin Abu Musab al-Zaquawi, hevur keypt 30 følsk donsk pass, sum hann rindaði góðar 600.000 krónur fyri. Berlingske Tidende skrivar, at passini eru frá árunum 1996 - 2001, og at maðurin, sum útvegaði passini, eitur Abu Rached. Fregnartænastan hjá donsku løgregluni, PET, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til tíðindini.

Spanska løgreglan veit ikki, hvar Abu Musab al-Zaquawi er, men nógv bendir á, at hann fjalir seg onkunstaðni í Evropa. Franska løgreglan vil vera við, at hann hevur verið heilin aftan fyri fleiri atsóknir, eitt nú eina bumbuatsókn í Bagdad tann 2. mars, sum kravdi 181 mannalív. Spanska løgreglan sigur seg hava prógv fyri, at nakrir av bumbumonnunum í madrid høvdu samband við al-Zaquawi so seint sum í januar.

Enn er eingin yvirgangsmaður tikin við følskum donskum passi, men spanska løgreglan sigur, at ein maður við svenskum passi hevði samband við teir, sum løgdu bumburnar í Madrid.

# Hon eigur at vitna fyri almenninginum

**Nevndin, sum kannar amerikonsku yvirgangstilbúgvingina upp undir 11. september-atsóknina, vil sleppa at avhoyra Condoleezu Rice, trygdarráðgeva, men forsetin sigur nei**

HOYRING
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Condoleeza Rice hevur givið kanningarnevndini eina frágreiðing, men tað var fyri afturlatnum hurðum, og tað er nevndin ikki nøgd við. Hon vil sleppa at avhoyra trygdarráðgevan í tí vanliga hoyringarrúminum, haðani alt verður sent beinleiðis í sjónvarpi.

Men George W. Bush, forseti, og stjórnin hava sagt kortanei. Grundgevingin er, at eingin trygdarráðgevi er avhoyrdur alment fyrr, og at samarbeiðið ímillum forsetan og trygdarráðgevan eigur at vera loyniligt.

Næstformaðurin í kanningarnevndini, Lee Hamilton, segði við sjónvarpið CNN um vikuskiftið, at nevndin fer at leggja trýst á forsetan og stjórnina. Hann helt, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri stjórnina og forsetan, verður Condoleeza Rice avhoyrd alment.

Fyrrverandi yvirgangsráðgevin hjá George W. Bush, Richard Clarke, segði í sínari frágreiðing í síðstu viku, at forsetin og trygdarráðgevin tóku ikki hóttaninar hjá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda í álvara, fyrr enn tað var ov seint. Hesum hevur Condoleeza Rice víst aftur, men hon vil kortini ikki siga alment, hvat hon visti, og hvat hon gjørdi.



*Minst 30 yvirgangsmenn ganga við følskum donskum passi, sigur spanska løgreglan*

# Sosialistarnir vunnu franska landspartavalið

**Flokkurin hjá Jacques Chirac, forseta var fyri einum lemjandi ósigri á landspartavalinum sunnudagin. Nú verður roknað við broytingum í stjórnini**

FRAKLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jean-Pierre Raffarin situr neyvan í franska forsætisráðharrasessinum nógvar dagar afturat, og hann verður neyvan tann einasti ráðharrin, sum noyðist at fara úr stjórnini.

Orsøkin er tann dyggi smeiturin, sum stjórnarflokkarnir UMP og UDF fingu á landspartavalinum sunnudagin. Gjáramorgunin vístu tølini, at flokkarnir høvdu fingið 37 prosent av atkvøðunum, meðan sosialistarnir høvdu fingið 50 prosent. Undan valinum høvdu teir konservativu meirilutan í 14 av teimum 22 landspørtunum. Nú hava teir bara meiriluta í tveimum landspørtum.

Tann stóra framgongdin hjá vinstravonginum leggur stórt trýst á Jacques Chirac, forseta, og hildið verður fyri vist, at hann fer at umskipa stjórnina. Politiska skipanin í Fraklandi er soleiðis háttað, at forsetin tilnevnir ein forsætisráðharra at útinna politikk forsetans, og Jean-Pierre Raffarin kann ikki kenna seg tryggan í stóli sínum, skriva tíðindastovurnar.

Raffarin er vorðin ill umtóktur orsakað av fleiri nýskipanum í almennu umsitingini og ymsum tiltøkum, sum hava havt til endamáls at liberalisera arbeiðsmarknaðin.

Landspartavalið gjørdist ikki tann stóri sigurin hjá tí sera høgrasinnaða Jean-Marie le Pen, sum kanningar undan valinum høvdu víst. Flokkur hansara. Front National, fekk 12,5 prosent av atkvøðunum. Á Valinum í 1998 fekk hann 15 prosent.